
SEV - stýrt í 50 ár av P. A. Pedersen og Højgaard & Schultz

Ognað minnið um Harry Fonsdal, civilverkfrøðing, sála



Søguligt yvirlit

Søta SEV's er helst lítið kend manna millum ídag, og eg skal heldur ikki í hesum fyrsta teigi troytta lesaran við tí keldutilfari, ið liggur til grund fyri hesa greinarøð. Tað má steðga til seinasta part. Men lat meg bert nevna, at at siga alt, ið her verður borið fram, hevur verið almannakunngjørt áður.

Harry Fonsdal var vestmenningur og útbúgvin civilverkfrøðingur frá lærda háskúlanum í Tróndheimi. Hann hevði longu frá 1935 syrgt fyri at regluligar regnmátingar vóru tiknar í Vestmanna, og grundað á mátingar framdar av norskum serfrøðingum gjørdi hann í 1936 ta fyrstu skitsuverkætlanina fyri útbygging av Fossá. Í 1938 varð Fonsdal setur sum løgtingsverkfrøðingur.

Í 1939 kom ein danskur verkfrøðingur, P. H. Diemar til Føroyar sum ráðgevi fyri eitt málingavirki. Fyri egna rokning byrjaði hann tá at arbeiða við øðrum verkætlanum og eftir fáum mánaðum kom hann til tað úrslit, at mátingarnar, ið vóru framdar av norsku serfrøðingunum (yvir 3 ár) vóru skeivar. Leynarvatn og ikki Fossá var besta orkukeldan at byrja við!

- Og her byrjaði so tann beiski orrustin, ið skuldi koma at kosta landinum 100-tals milliónir kr. Ja, í dag tori eg at siga at talan er um milliardupphædd, tá tikið verður við, at føroyingar nú í hálvthundrað ár hava rindað heimsmet-høgar elprísir.

Tíðin fram til apríl 1940 fór til endaleyst kjak um uppskotið hjá Diemar mótvegis verkætlanini hjá Fonsdal - og einki varð gjørt. Fonsdal var í ørindum í Noreg, tá landið varð hersett (9. apríl 1940) og kom ikki aftur til Føroyar fyrr enn í okt. 1945. Diemar hevði tá longu verið her í uml. 3 mánaðir og hevði tað eydnast honum at fáa Kvívíkar og Kollafjarðar kommunur at skriva undir ein sáttmála um útbygging av Leynarvatn.

Upprunaliga fevndi 1937-verkætlanin hjá Fonsdal bert um Streymoynna, men nú búskaparliga vstøðan í landinum var so nógv betri, legði hann fyri tingið uppskot um at útbyggingin eisini skuldi fevna um Vágoynna og Eysturoynna. Hann skeyt samstundis upp at stovna eitt felag S.E.V. (Streymoyggin, Eysturoyggin, Vágoyggin), ið skuldi fáa einkarætt til útbygging av vatnorkuni í hesum 3 oyggjunum, og ein nevnd »Fossánevndin« varð sett at taka sær av málinum. Men ósemjur millum avvarandi kommunur og ikki minst uppílegging Diemars fyri at takka, gjørdi at naggatødn kom í.

So knappliga á einum fundi (15.12.45) kom fram, at Leynarvatns-uppskotið hjá Diemar (1939) longu var góðkent av danska Elektricitetsrádet. Fyri Fonsdal (og »Fossánevndina«) var nú einki annað at gera enn at innkalla umboð fyri allar kommunurnar í teimum 3 oyggjunum til fundar (18.12.45) at viðgera nýggju støðuna, og samtykt varð tá at biða løgtingið taka sær av útbyggingini. Løgtingið samtykti (06.01.46) at lata Løgtingsverkfrøðingin útgreina málið.

Sum skilst heitti løgtingið ella tann løgtingsnevnd (»Landsnevndin«) ið hevði málið um hendur, ongantið á Diemar um at koma við einum ítøkiligum uppskoti til útbygging av Leynarvatn, hóast hann brúkar orðingar sum »Á Færøernes Lagtings vegna skal vi« og líknandi í brøvum til danska ministeriið.

21.03.46 møtur Diemar upp í Landsnevndini við einum nýggjum uppskoti til útbygging av Leynarvatn og biður um at tað verður sent til Elektricitetsrádet. Áheitanin varð ikki gingin honum á møti, so hann sendi tað inn sjálvur. Verkætlanin hjá Løgtingsverkfrøðinginum (Fossá-verkætlanin) varð - aftaná kanning av norskum serfrøðingum - persónliga (Fonsdal) handað Ministeriet for offentlige arbejder í juli 1946. Ministeriið sendi málið víðari til Elektricitetsrádet og danska »Vandbygningsvæsenet« - V.B.V.

3/4 ár gekk áðrenn svar kom aftur - V.B.V. svaraði 19.02. og Elektricitetsrádet 07.03.47. Seinni (05.05.47) kom so eitt skriv eisini frá Diemar.

Nú kundi tað fyri sakkunnleikan verið áhugavert at greitt nærri frá innihaldinum í svarunum frá V.B.V. og Elektricitetsrádet , men tað vildi her fört ov langt. Lat meg bert stutt nevna at punkt fyri punkt verður Fossá-verkætlanin hjá Fonsdal (og norsku serfrøðingunum) skrødd niður til fyrimuns fyri Leynarvatnsætlanina hjá Diemar, ja, sjálvt veðurgudarnir verða sendir at geva Diemar 30% meira regn enn Fonsdal.

Urskurðurin hjá V.B.V. er, at vit eiga at byrja við at byggja eitt lítið verk - uml. 1,3 mill. kWh (nýtslan í dag er uml. 180 mill. kWh) og so kunnu vit: »I ro og mag foretage de særdeles ønskede yderligere Undersøgelser«. (1,3 mill. kWh svarar til tað o.u. 250/300 húski nýta í dag). Dentur verður lagdur á, at prísirnir helst koma at falla við o.u. 30% tey 3-5 fyrstu árini, og at vit ikki kunnu rokna við at fáa selt alla framleiðsluna frá Fossáverkinum (15 mill. kWh) og at hallið sostatt kundi koma upp í milliónir.

V.B.V. endar sínar viðmerkingar við einari beinleiðis misbjóðing mótvegis Fonsdal (og norsku serfrøðingunum) við at skjóta upp Diemar sum ráðgeva fyri tað framhaldandi arbeiði við verkætlanini. (framhald)

Tormóður Dahl



Gamal skaði forðaði Regini

MAGNUS DAM

Ein gamal skaði forðaði Regini Vágadal í at gera seg galdandi av álvara seinasta finaludagin, sunnudagin, í kappingini um at gerast heimsins sterkasti maður.

Regin endaði á einum áttanda og seinasta plássi í kappingini, og fekk hann samanlagt 24 stig í allari kappingini.

Tað var leygardagin, at gamli skaðin hjá Regini breyt út. Sum sekstan ára gamal breyt Regin øklaknútin í øðrum fótinum, og av og á kemur skaðin framaftur, soleiðis at hann hevur torført við at stíga á fótin.

Aftaná kappingina leygardagin um kvøldið byrjaði hann at fáa ilt í fótin. Hann og venjarin Tony fóru seinni til lækna og, hann fekk sproytu fyri pínuna í fótinum.

Hann hevði tó ilt í fótinum aftur sunnudagin, og læknin ráddi honum frá at fara undir kappingarnar, men teir vundu fótin inn í tape, og Regin royndi so at fara í holt við kappingarnar.

Tann fyrsta var at ganga 60 metrar við einum 120 kg tungum sylindara í hvørjari hond. Regin fullførdi, men hann endaði á aftasta plássið.

Næsta kappingin var rættstøðulyft, og har endaði Regin á einum sjeynda plássi. Fóturin darvaði honum nógv, og í seinastu kappingini, sum var at bera trý tung lodd fýra trin upp, endaði hann eisini á einum sjeynda plássið. Regin var tó stórliga fagnaður, tí hann hóast skaðan var við í øllum kappingunum, og Tony Dam væntar, at Regin verður við í kappingini aftur næsta ár.


-Tú kanst sjálvandi ikki siga við vissu, um skaðin forðar honum í at halda áfram við tílíkum kappingum, men tað vóna vit ikki, sigur Tony.

-Vit kunnu tillaga venjingina til fótin, soleiðis at skaðin ikki brýtur upp aftur, og so royna vit aftur, sigur hann.


Heimsins sterkasti maður eitur sostatt ikki Regin Vágadal á hesum sinni, men Magnus Ver Magnusson og er úr Íslandi.

Hann fekk tilsamans 53 stig í kappingini og hetta er fjórðu ferð at hann gerst heimsins sterkasti maður. Hann vann kappingina fyri fyrstu ferð í 1991, og hann vann aftur í 1994, 1995 og nú aftur í ár.

Finnin Riku endaði á øðrum plássið við 44 stigum, og tann sum var nummar sjey, eitt pláss frammanfyri Regin hevði 25 stig, eitt meira enn Regin.



Ein gamal skaði í fótinum forðaði Regini í at gera seg galdandi av álvaru í finaluni, men vit royna aftur næsta ár, sigur Tony Dam, venjari og hjálpari hjá Regini Vágadal, heimsins áttandsterkasta manni



at taka tað róliga
ff

